# Roykt tvøst til drotningina

**Í samband við upplatingina av Útnorðurmiðstøðini á Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn eru fimm fólk frá Hotel Hafnia farin til Keypmannahavnar at standa fyri móttøku, sum verður hósdagin. Margretha drotning verður fyrsti gesturin**

MÓTTØKA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*




*Fimm fólk og ein rúgva av stórum íløtum við mati av Hotel Hafnia fóru týsdagin við flogfari til Keypmannahavnar í samband við, at Norðuralantsbryggjan letur upp*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:**
Tað verða fólk frá Hotel Hafnia í Havn, sum fara at standa fyri føroysku móttøkuni, sum verður hósdagin í samband við upplatingina av Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn. Allur maturin verður føroyskur burturav, og Margretha drotning verður fyrsti gesturin á móttøkuni.

Tey skriva seg inn á flogvøllinum, áðrenn flogfarið hjá Atlantsflogi fer úr Vágum týsdagin. Fimm fólk og ein rúgva av ferðagóðsi, sum helst skal flytast skjótt og koma i kulda beinanveg, tey koma til Danmarkar, greiðir Martin Restorf, stjóri á Hotel Hafnia, frá.

– Vit hava 19 rættir á borðinum, tá latið verður upp, greiðir hotelstjórin frá. Tað er føroyskur matur. Bæði vanligur og eisini eitt sindur forkunnugur. Kjøt og grind. Fiskur og skeljamatur, og hvat nú finnast kann upp á til eina slíka samkomu.

Eitt tað kanska mest forkunnuga, sum verður at smakka á móttøkuni, verður roykt tvøst við piparrótskremi, sigur hann.

Umframt allan matin, tey hava við sær, er ymiskt til at pynta básin við. Tað verður eisini slíkt, sum vendir huginum at Føroyum, sigur Martin Restorff.

Tað er frammanundan sent til Danmarkar við skipi.

Eitt nú nevnir hann, at øll skelti, sum verða brúkt at kunna gestirnar um tað, sum er at síggja, eru gjørd av føroyskum malargróti.

Móttøkan, sum Hotel Hafnina fer at stand fyri, verður hósdagin 28. november. Fyrst at smakka tað, á borðinum stendur, verða drotningahúnini, sigur Martin Restorff. Síðan verður opið fyri almenninginum.

Tað er fyrstu ferð í meira enn hálvthundrað ára longu søgu Hotel Hafnia, at hotellið stendur fyri einum slíkum tiltaki uttanlands, sigur hann. Avtalan er komin i lag gjøgnum føroyska sendimannin í Keypmannahavn,Trygva Johansen, sigur Martin Restorff

Íslendingar og grønlendingar hava eisini líknandi móttøkur á sínum básum á Bryggjuni.

# Familjan framvegis fremst

**Miðflokkurin setir framvegis familjuna fyrst, sigur løgtingsmaður floksins eftir landsfundin, sum var um vikuskiftið**

LANDSFUNDUR
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

Rentustuðulin skal ikki lækka, og mjólkarprísurin ikki hækka, siga miðflokkafólk, sum hildu landsfund í Havn um vikuskiftið. Og tað kemur ongantíð upp á tal at loyva samkyndum parløgum, so leingi Miðflokkurin hevur ávirkan á landsins stýri.

Jenis av Rana, tingmaður Miðfloksins, sigur, at fundurin var samdur um, at førdi politikkur floksins skal halda fram.

Landsstýrismaður floksins fekk eisini frá landsfundinum stuðul til framhaldandi at reka tann politikk, hann higartil hevur rikið á heilsuøkinum, sigur Jenis av Rana.

Familjupolitikkur stendur sera sjónskur í skjøldi Miðfloksins. Og hesin landsfundurin var einki frávik í so máta.

Men flokkurin harmast um, at tann veikasti føroyingurin, tað ófødda barnið, verður ikki nóg væl vart, heldur landsfundur Miðfloksins.

– Og illa dámar okkum, at læknar brúka sosialar grundgevingar fyri at loyva fosturtøku, sigur Jenis av Rana.

Hann sigur, at tað er beinleiðis skomm at tosa um ringar tíðir í Føroyum í dag. Tí tað passar ikki, sigur hann. Vit hava tað tímiliga so gott sum nakar, sigur Jenis av Rana. So handan grundgevingin heldur als ikki, staðfestir hann avgjørdur.

Eitt evni, sum nógv verður viðgjørt á fundum hjá Miðflokkinum, eru viðurskifti, sum hava við samkynd at gera. Eisini á landsfundinum nú um vikuskiftið var hetta evnið uppi og vendi.

Jenis av Rana sigur, at tað fer ikki at koma upp á tal at loyva samkyndum parløgum í Føroyum. Hann væntar heldur ikki, at nakað slíkt uppskot kemur frá landsstýrismanninum við lógarmálum, sum annars hevur verið uppi og vent.

– At koma við einum slíkum uppskoti er tað sama sum at siga samgonguna upp, er Jenis av Rana, løgtingsmaður Miðfloksins, púra sannførdur um. Hesi fókini hava brúk fyri hjálp, og tey skulu fá alla ta hjálp, tey yvirhøvur hava fyri neyðini, sigur hann. Men at broyta landsins lógir til frama fyri tey, kemur yvirhøvur ikki upp á tal.



*Jenis av Rana, tingmaður Miðfloksins, sigur, at tað kemur ikki upp á tal at loyva skrásettum parløgum millum samkynd. Kemur eitt slíkt uppskot í Løgtingið, er hetta tað sama sum at siga samgonguna upp. Hvørki meira ella minni*



# Annita verjir SvF

**Landsstýriskvinnan við mentamálum verjir óheftu støðuna hjá Sjónvarpi Føroya. Eingin skal hava serstøðu í tíðindaflutninginum hjá Sjónvarpinum – heldur ikki løgmaður, sigur Annita á Fríðriksmørk, landsstýriskvinna við mentamálum**

JOURNALISTIKKUR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*




*Annita á Fríðriksmørk, landsstýriskvinna, heldur ikki, at spurningarnir frá Fólkaflokkinum um leiklut Tjóðveldisfloksins í bók um løgmann hava uppiborið svar*
*Mynd: Jens K. Vang*

Longu áðrenn bókin »Skjót journalistin« er útkomin hevur hon skapt rok. Fólkaflokkurin hevur sent Tjóðveldisflokkinum bræv, tí hann hevur hoyrt, at bókin svertar umdømið hjá Anfinni Kallsberg løgmanni.

Fólkaflokkurin spyr í fyrsta lagi, hvønn leiklut Tjóðveldisflokkurin hevur í bókaútgávuni. Men málið steðgar ikki har. Fólkaflokkurin dregur Sjónvarp Føroya upp í leikin og setir óheftu støðuna hjá almenna fjølmiðlinum í eitt ringt ljós.

– Heldur Tjóðveldisflokkurin, sum umsitur mentamál og harvið SvF, tað vera sambærligt við størvini hjá rithøvundunum í almenna sjónvarpinum at spilla umdømi løgmans?, spyrja tingmenn fólkafloksins í brævinum til Sjónvarp Føroya.

### Kann kløkka fólk

Annita á Fríðriksmørk, landsstýriskvinna við mentamálum, umsitur Sjónvarp Føroya. Hon hevur ongan hug at taka brævið frá Fólkaflokkinum fyri fult.

– Tjóðveldisflokkurin viðger øll mál, sum koma inn, men eg haldi ikki, at hatta brævið er vert at taka í fullum álvara. Hetta vísir bara, at Fólkaflokkurin hevur trupulleikar, sum teir royna at flyta yvir á okkum. Eg havi ikki lisið bókina, og veit tí onki um nakra útsverting av løgmanni. Eingin hevur lisið bókina, sum eg havi skilt tað – heldur ikki Fólkaflokkurin. So eg skilji ikki trupulleikan, sigur Annita á Fríðriksmørk.

Ein aðalregla er, at politiski myndugleikin einki hevur við innihaldið í almenna sjónvarpinum at gera, og tí er hon ikki so lítið skelkað um, at Fólkaflokkurin tykist vilja seta mørk fyri, hvat kann viðgerast í Sjónvarpi Føroya.

– Eg vil fegin verja ta óheftu støðuna, sum sjónvarpið hevur og skal hava. Eingin skal hava serstøðu í tíðindaflutninginum hjá Sjónvarpinum. Hvørki eg ella løgmaður. Vandin við einum slíkum brævi er, at fjølmiðlafólk aftra seg at viðgera eym og viðkomandi evni. Hetta kann forskrekkja tíðindafólk, og tað er ódámligt, sigur Annita á Fríðriksmørk.

### Eitt mark fyri øllum

Verjir Annita á Fríðriksmørk Sjónvarp Føroya, so leggur hon samstundis dent á, at øll hava síni rættindi og skulu viðfarast rættvíst.

– Sum politikari mást tú rokna við, at tað tú gerst, hevur áhuga millum fólk. Mark skal vera fyri øllum, sum almennir persónar fáast við. Sum journalistur er eisini alneyðugt, at tú ert politiskt óheftur, serliga um tú arbeiðir fyri almenna sjónvarpið. Men vit kenna ikki innihaldið í bókini, so tað ber illa til at viðmerkja nakað, sigur Annita Fríðriksmørk.

Landsstýriskvinnan dugir væl at síggja, at tíðindaleiðarin á SvF kom í eina óhepna tvístøðu, tí hann bæði var tíðindaleiðari og rithøvundur í eymari bók.

– Journalisturin hevur longu tikið fullar avleiðingar av, at hann er komin í eina tví støðu. Og tað er ikki vanligt, at fólk taka avleiðingar í Føroyum, sigur hon.

# Teir smáu eru illa við

**Paranoia, kallar Jenis av Rana úr Miðflokkinum handfaringina hjá av einari eldfimari bók, sum nærkast útgávudegnum. Smáu flokkarnir eru illa við av nýggjasta keglinum í samgonguni, og Kári P. Højgaard væntar ikki, at samgongan situr skeiðið út**

POLITIKKUR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*



Nú er so greitt, at bókin kemur í bókabúðirnar 1. desember.

Eisini hevur frætst, at Tjóðveldisflokkurin eigur lut í hesi bókaútgávu. Hesi tíðindi hava skakað tingmenn Fólkafloksins. Bókin er sostatt framhald av tí miðvísu undirgraving, sum byrjaði við brævinum hjá Kjartani Hoydal úr London í 2001um at sabotera løgmann. Hon belt fram, tá tjóðveldistingmaður í fjør summar leyp á løgmann og setti samgonguna í vanda, og aftur tá Tjóðveldið var við í misálitinum á Jørgen Niclasen.

Sjónvarpsstjórin er limur í felagskapinum "Hesuferð" og tí ein móttakari av loyniboðunum úr London at undirgrava politikk løgmanns. Annar bókahøvundurin er í farloyvi sum tíðindaleiðari og hin virkandi tíðindaleiðari í SvF. Teir royna nú aftur við hesi bókaútgávu at niðra landsins politiska leiðara.

*Orðingar í brævinum frá tingmanning Fólkafloksin benda á paranoia, heldur læknin og tingmaðurin Jenis av Rana*

Tú skuldi ikki hildið, at nakað kann skelka flokkarnir, sum samstarva í politisku samgonguni. Teir hava upplivað so mangt. Men

brævið, sum Fólkaflokkurin hevur sent Tjóðveldisflokkinum hevur kortini gjørt umboðini fyri smáu flokkarnar illa við.

Í brævinum skriva tingmenn Fólkafloksins millum annað, at »tað hevur ljóðað, at bók er ávegis, sum hevur til endmáls at sverta umdømið hjá Anfinni Kallsberg og soleiðis at beina fyri tí áliti, føroyingar hava á løgmanni«. Eisini siga fólkfloksmenn seg »hava frætt, at Tjóðveldisflokkurin eigur lut í hesi útgávu«.

### Helst bangnir

Læknin og tingmaður Miðfloksins, Jenis av Rana, er skjótur at seta diagnosuna, tá við spyrja hann, hvat honum dámar ákoyringarnar hjá Fólkaflokkinum.

– Hetta líkist mest av øllum paranoia, sigur Jenis av Rana. Ella vita teir meira enn vit onnur, leggur hann afturat.

Ógvusliga reaktiónin hjá Fólkaflokkinum upp á eina bók, sum enn ikki er útkomin og eingin kennir innihaldið av, hevur eftir øllum at døma skatt flokkin meira, enn, um teir høvdu tagt. Tað heldur maðurin í miðjuni í øllum førum.

– Tað er løgið, at Fólkaflokkurin er farin at klandrast um nakað, sum ongin veit nakað um. Tað sigur mær tað sama, sum tað sigur øðrum. Teir eru bangnir. Hvat er tað, teir hava at krógva?, spyr Jenis av Rana.

Hann heldur ikki, at tað kann koma óvart á nakran, at nakrir journalistar hava sett sær fyri at kanna, hvat hendi tey árini, tá Anfinn Kallsberg var bókhaldari á Frostvirkinum í Norðdepli, tí málið hevur hingið í luftini í nógv ár.

– Øll vistu, at tað mátti koma. Tosað hevur verið um fortíðina hjá løgmanni í fleiri ár, og tey flestu hava vónað, at løgmaður fór at vera reinsaður, men reaktiónin frá Fólkaflokkinum fær meg at óttast, at teir vænta tað øvugta, sigur Jenis av Rana.

Kemur bókin við prógvum um, at okkurt ólógligt fór fram, tá løgmaður fyri góðum 20 árum síðan var bókhaldari á Frostvirkinum, so heldur Jenis av Rana, at samgongan hevur ein álvarsligan trupulleika.

### Á deyðastráð

Kári P. Højgaard, tingmaður Sjálvstýrisfloksins, vil ikki siga so nógv um málið, tí tað er millum stóru flokkarnar í samgonguni, men hann undrast.

– Eg skilji hetta als ikki. Eg kenni ikki innihaldið í bókini, og tí kann eg einki siga um hetta. Eg trúði, at hetta var úti av verðini. Um tað aftur verður sáddur ivi um løgmansembæti, so er tað ótrúliga óheppið, sigur Kári P. Højgaard.

Spurdur, hvat hetta merkir fyri samgongustevið, vísir hann á tað, hann áður hevur sagt.

– Eg meti stevið í samgonguni at vera so vánaligt, at eg vænti ikki, at hon situr tíðina út.